# Nordik-
# PensjónsRøkt

BANKNORDIK

**NordikPensjónsRøkt**

Við NordikPensjónsRøkt kann BankNordik bjóða eina dygdargóða tænastu, ið støðugt røktar tína pensjónssamansparing. Tú fært fyrimunin av at hava tína egnu persónligu goymslu, samstundis við at serfrøðingar úr bankanum røkta tíni virðisbrøv.

Royndir vísa, at íløgur í eina samanseting av partabrøvum og lánsbrøvum í longdini geva størst avkast samanborið við at hava peningin standandi í bankanum. Við NordikPensjónsRøkt fært tú fyrimunirnar av at seta tína samansparing í virðisbrøv, uttan at tær nýtist at fylgja við á virðisbrævamarknaðinum. Serfrøðingarnir í bankanum syrgja fyri at gera íløgurnar við støði í tínum persónliga íløguprofili, men tú hevur altíð yvirlit yvir, júst hvørji virðisbrøv tú eigur.

**Hvør kann fáa NordikPensjónsRøkt?**

Allir persónar, ið hava eina pensjónssamansparing, kunnu gera eina avtalu um NordikPensjónsRøkt.

**Soleiðis virkar NordikPensjónsRøkt**

Saman við tær finna vit tín íløguprofil, sum tekur støði í tínum váðafýsni, aldri og pensjónsaldri, og við støði í íløguprofilinum verður tín pensjónssamansparing sett í virðisbrøv. Tín ráðgevi kennir tíni fíggjarviðurskifti, og tín pensjónspakki verður settur saman, soleiðis at hann hóskar júst til tín.

BankNordik fær fulltrú til at røkta íløgurnar innanfyri karmarnar í avtaluni, so at vit kunnu seta tína pensjónsamansparing júst har, sum bankin metir, at tað loysir seg best í mun til tín íløguprofil. Serfrøðingarnir í bankanum hava støðugt eftirlit við tínum íløgum.

Niðanfyri er ein íløguætlan fyri pensjónir, sum eru inngoldnar áðrenn 1. januar 2014.

| Váðamynd | Tíðarkarmur: 0-5 ár | Tíðarkarmur: yvir 5 ár |
|---|---|---|
| **Lágur váði** | 100 % lánsbrøv<br>0 % donsk partabrøv<br>0 % útlendsk partabrøv | 70 - 90 % lánsbrøv<br>10 - 30 % donsk partabrøv<br>0 % útlendsk partabrøv |
| **Miðal váði** | 50 - 70 % lánsbrøv<br>30 - 50 % donsk partabrøv<br>0 % útlendsk partabrøv | 40 - 60 % lánsbrøv<br>20 - 40 % donsk partabrøv<br>10 - 30 % útlendsk partabrøv |
| **Høgur váði** | 30 - 50 % lánsbrøv<br>30 - 50 % donsk partabrøv<br>10 - 30 % útlendsk partabrøv | 10 - 30 % lánsbrøv<br>30 - 50 % donsk partabrøv<br>30 - 50 % útlendsk partabrøv |

**BankNordik**

**Telefon** 330 330
**Telefaks** 316 950

**pensjon@banknordik.fo**
**www.banknordik.fo**

Niðanfyri er ein íløguætlan fyri pensjónir, sum eru inngoldnar eftir 1. januar 2014.

**Aldur 0 – 34 ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 60 – 90 % lánsbrøv<br>10 – 40 % partabrøv | 40 - 70 % lánsbrøv<br>30 - 60 % partabrøv | 20 - 50 % lánsbrøv<br>50 - 80 % partabrøv |

**Aldur 35 – 44 ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 60 – 90 % lánsbrøv<br>10 – 40 % partabrøv | 45 - 75 % lánsbrøv<br>25 - 55 % partabrøv | 30 - 60 % lánsbrøv<br>40 - 70 % partabrøv |

**Aldur 45 – 49 ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 70 – 100 % lánsbrøv<br>0 – 30 % partabrøv | 55 - 85 % lánsbrøv<br>15 - 45 % partabrøv | 40 - 70 % lánsbrøv<br>30 - 60 % partabrøv |

**Aldur 50 – 59 ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 70 – 100 % lánsbrøv<br>0 – 30 % partabrøv | 60 - 90 % lánsbrøv<br>10 - 40 % partabrøv | 50 - 80 % lánsbrøv<br>20 - 50 % partabrøv |

**Aldur 60 – 64 ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 80 – 100 % lánsbrøv<br>0 – 20 % partabrøv | 70 - 100 % lánsbrøv<br>0 - 30 % partabrøv | 60 - 90 % lánsbrøv<br>10 - 40 % partabrøv |

**Aldur 65 – 69 ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 90 – 100 % lánsbrøv<br>0 – 10 % partabrøv | 80 - 100 % lánsbrøv<br>0 - 20 % partabrøv | 70 - 100 % lánsbrøv<br>0 - 30 % partabrøv |

**Aldur 70+ ár**

| **Lágur váði** | **Miðal váði** | **Høgur váði** |
|---|---|---|
| 100 % lánsbrøv<br>0 % partabrøv | 90 - 100 % lánsbrøv<br>0 - 10 % partabrøv | 85 - 100 % lánsbrøv<br>0 - 15 % partabrøv |

Tá vit handla, senda vit tær altíð eina handilsnotu, og um tú til dømis ynskir at vita, hvørjar hugsanir eru handan umleggingar í tíni goymslu, kanst tú altíð spyrja á tíni deild ella lesa um umleggingarnar á www.banknordik.fo. Sjálvt um umsitingin av tíni pensjónssamansparing er løgd í hendurnar á BankNordik, kanst tú framhaldandi fylgja við í gongdini. Tað gevur tær tryggleika og gjøgnumskygni.

Í Netbankanum frá BankNordik, hevur tú møguleika fyri at hava yvirliti yvir, hvussu virðisbrøvini í tíni goymslu hava klárað seg. Harumframt fært tú hálvárligar avkastsfrágreiðingar, sum lætt og greitt geva tær yvirlit yvir, hvat avkast tínar íløgur hava givið.

**Váðamerking frá Fíggjareftirlitinum**

Fíggjareftirlitið hevur ásett reglur um váðamerking av íløgum, har íløgurnar verða býttar upp í grønar, gular og reyðar bólkar. Tú kanst fáa meira kunning um váðamerking á www.banknordik.fo/ilogur.

**Alment um íløgur**

At gera íløgur er altíð knýtt at einum ávísum váða fyri, at væntanirnar til framtíðar gongdina ikki vísa seg at halda. Íløgur í virðisbrøv kunnu føra til eitt tap treytað av kursbroytingunum, og íleggjari hevur sjávur ábyrgdina fyri hesum váða.